# Seta á stovn Kommunalt Arbeiðsgevarafelag

*Tann 5. oktober er settur at vera stovningardagurin fyri nýggja kommunala arbeiðsgevarafelagið, sum er tikið framaftur eftir at hava ligið í eini skuffu síðani miðskeiðis í áttatiárunum. — Vit gera tað fyri at halda eitt javnt hóskandi lønarlag, sigur Jógvan K. Mørkøre, formaður í Kommunufelagnum, sum er stigtakari*

SVEINUR TRÓNDARSON

Seinastu tíðina er tað vorðið alt meira vanligt, at t. d. Starvsmannafelagið ferðast frá kommunu til kommunu at gera sáttmálar, og tað er m. a. fyri at sleppa undan at sáttmálarnir víkja ov nógv frá hvørjum øðrum, at nýggja felagið verður stovnað.

- Í løtuni gongur rákið tann vegin, at lønarlagið verður eins líkamikið hvar í landinum tú er, og tað er fyri at halda eitt javnt hóskandi lønarlag, vit seta á stovn eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Kortini viðgongur Jógvan, at hann ikki hevur tosað við Starvsmannafelagið um hvussu arbeiðast skal frameftir.

- Nei, tað havi eg ikki. Og eg haldi heldur ikki, at tað er rætt at gera tað enn. Lat okkum fyrst fáa felagið upp á beinini, sigur formaðurin í Kommunufelagnum.



Jógvan K. Mørkøre

### Gomul ætlan

Ætlanirnar um at seta á stovn eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag eru ikki nýggjar. Minni enn so. Miðskeiðis í áttatiárunum varð gjørd ein roynd, men hon datt niðurfyri. Tá var ætlanin komin rættiliga langt, men so kom kreppan, og tey næstu árini máttu kommunurnar brúka alla orku upp á kreppuloysnir.

- Men vit høvdu gjørt eitt stórt fyrireikingararbeiðið, so vit vóru rættiliga væl fyri tá, sigur Jógvan.

Hóast fyrireikingararbeiðið bert var gjørt frá kommunalari síðu, so er Jógvan vísur í, at grundarlagið var gott til at byrja eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag, men tað skuldu altso ganga umleið 15 ár, áðrenn tað veruliga kom.

Formaðurin í Kommunufelagnum sær einki løgið í at gera eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Hann heldur tað verða eins náttúrligt og tað er fyri privat feløg, at gera eitt landsdekkandi arbeiðsgevarafelag, sum hevur samráðingarrætt. Og tá kommunur ikki hava loyvið til at gerast limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, so er hetta tann skilabesta loysnin.

- Tankin og endamálið við okkara felag er tann sami. Men fyri at kommunurnar kunnu geva frá sær samráðingarrætt, so mugu tær hava loyvið frá landsstýrinum fyrst, sigur hann.

### Helmingurin er málið

Jógvan Mørkøre leggur eina við, at kommunala arbeiðsgevarafelagið verður stovnað hesaferð. Seinast gekk tað eitt sindur seint fyri seg, og tað vil hann ikki skal henda hesaferð.

- Vit hava longu fingið fráboðan frá 12 kommunum, sum vilja vera við, men málið er, at helmingurin av kommununum í Føroya Kommunufelag, skulu gerast limir. Men felagið verður stovnað undir øllum umstøðum, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Tað er hansara fatan, at tað í fyrsta umfari ikki hevur so stóran týdning at allar eru við at stovna felagið, tí tær kunnu koma upp í aftaná.

- Føroya Kommunufelag stendur sum stigtakari av felagnum, men tað merkir ikki, at felagið bara er ætlaður limakommununum í Kommunufelagnum. Allar kommunur í landinum eru vælkomnar at gerast limir í felagnum, og tað vóna vit eisini at tær gerast, sigur Jógvan.

### Limagjald eftir lønarútgjaldingum

Sum vanligt er, tá eitt felag verður stovnað, so eru tað limirnir, sum skulu gjalda tað, sum tað kostar at reka felagið. Her hugsar Jógvan sær, at eitt fólk verður sett at taka sær av rakstrinum, fyri at talan ikki skal gerast um vinstrahondsarbeiði, sum hann tekur til.

- Tað er neyðugt, tí talan er um eitt stórt og tungt øki. Tì er neyðugt at seta fólk at taka sær av tí. Um tað verður í hálvum ella fullum starvi er ov tíðliga at siga nakað um enn.

Kostnaðin av felagnum hugsar hann sær, at limirnir í felagnum skulu bera, og hann verður býttur eftir, hvussu stórar lønarútreiðslurnar hjá kommununi eru.

- Eg hugsi, at tað er tann rættasta loysnin, sigur Jógvan K. Mørkøre.

- Tað er sami leistur, sum verður brúktur í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Og formaðurin í Kommunufelagnum er helst á rættari leið, tí umframt tær kommunur, sum hava boðað frá, at tær taka undir við uppskotinum, so er ikki óhugsandi, at tær stóru kommunurnar taka undir við uppskotinum um eitt felags kommunalt arbeiðsgevarafelag.

*Stóru kommunurnar:*

## – Skilagóður tanki

**Hóast Klaksvíkin ikki er limur í Kommunufelagnum, men í samskipanini, so er ikki so kalt millum feløgini bæði, at býráðsformaðurin í Klaksvík ikki dugir at síggja fyrimunirnar í einum kommunalum arbeiðsgevarafelag**

SVEINUR TRÓNDARSON

- Hóast vit ikki hava viðgjørt málið í Kommunusamskipan Føroya, so er avgjørt nógv skilagott í hasum uppskotinum, sigur Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík.

Klaksvíkar kommuna hevur lutfalsliga nógv starvsfólk, og tí kunnu vera bæði fyrimunir og vansar í einum kommunalum arbeiðsgevarafelag. Kortini dugir Jógvan við Keldu væl at síggja møguleikarnar við einum slíkum felagi.

- Eg eri av tí fatan, at tað er rættast at tað eina felagið hevur samráðingarrættin fyri kommunurnar, og tað er ikki óhugsandi, at tað verður eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag, sigur býráðsformaðurin í Klaksvík áðrenn hann leggur afturat, at áðrenn nøkur avgerð verður tikin frá stóru kommununum, skal málið viðgerast bæði væl og virðiliga í Kommunusamskipan Føroya.



Jógvan við Keldu

Spurdur um nøkur orsøk er til iva hjá stóru kommununum at fara upp í eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag, sigur Jógvan, at tað kann verða ein spurningur um, hvussu felagið er skipað. — Kommunurnar í samskipanini eru so nógv tær størstu í landinum, og tað eru eisini tær, sum hava flestu starvsfólkini, so tað er nakað, sum vit mugu hava í huganum, tá vit einaferð fara at hyggja at málinum.

Tá tað snýr seg um skipan av felagnum, so er uppskotið um at felagið skal skipast á sama hátt sum Føroya Arbeiðsgevarafelag, ikki so fjart frá býráðsformanninum í Klaksvík. Hann heldur tað vera eina rímuliga skilagóða loysn. — Eg kundi eisini hugsað mær, at limagjaldið verður roknað sum partur av lønargjaldingunum. Tað er nokkso náttúrligt, sigur hann.

Men áðrenn hann og hinir borgarstjórarnir í teimum stóru kommununum kring landið taka støðu til málið, so er nógv, sum skal fáast upp á pláss felagnum viðvíkjandi. Fyrst av øllum skal Kommunusamskipanin hava eina áheitan frá Kommunufelagnum, og tann áheitanin er ikki komin enn. So skal alt málið, sum tað er viðgerast í samskipanini og ikki fyrr enn tað er gjørt, taka kommunurnar støðu til um tær vera við í nýggja kommunala arbeiðsgevarafelagnum.

*Starvsmannafelagið:*

## – Vit arbeiða víðari við okkara ætlanum

**- Er endamálið at samstarva um eitt skilagott felags lønarlag, so eru vit als ikki bangin fyri at samstarva við eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Men talan má vera um samstarv, sigur Gunnleiv Dalsgarð formaður í Starvsmannafelagnum**

SVEINUR TRÓNDARSON

- Soleiðis var ikki tá kommunurnar í áttatiárunum ætlaðu at seta á stovn kommunalt arbeiðsgevarafelag, tí tá høvdu tær gjørt alt klárt áðrenn feløgini, t. d. Starvsmannafelagið, varð tikið við upp á ráð. Tá er ikki talan um samstarv. Og soleiðis verður støðan ikki hesaferð, sigur Gunnleiv Dalsgarð avgjørdur.

Seinastu tíðina hevur Starvsmannafelagið gjørt sáttmálar við nakrar kommunur, og í løtuni er felagið í samráðing við aðrar kommunur um sáttmála fyri teirra starvsfólk. So nýggja arbeiðsgevarafelagið kemur ikki óvart á formannin í Starvsmannafelagnum.

- Vit leggja okkum ikki út í, um kommunurnar gera eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Vit brúka okkara orku til at gera eitt seriøst arbeiði. Og tí fara vit at tryggja okkum, at ætlanirnar við felagnum eru at gera arbeiðs- og sáttmálaumstøðurnar hjá starvsfólkun-um betri, samstundis sum viðurskiftini verða líka kring alt landið, sigur Gunnleiv Dalsgarð.

Fyri hansara felag er tað hetta, sum hevur ligið fremst í huganum, og tað er ein av orsøkunum til, at tey samráðast við kommunurnar í løtuni.

- Tað er júst fyri at betra um sáttmálaviðurskiftini hjá starvsfólkunum. Vit hava jú havt sáttmálar við Klaksvíkar Kommunu og við Tórshavnar Kommunu í fleiri ár, so hetta er eingin kollvelting í so máta, men heldur ein standardisering av viðurskiftunum, sigur Gunnleiv.

Tá kommunurnar miðskeiðis í áttatiárunum royndu at gera eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag var núsitandi formaðurin ikki limur í Starvsmannafelagnum. Men hann hevur kannað, hvussu tað gekk fyri seg, og tað hann er komin til, ynskir hann ikki at síggja enn einaferð.

- Sum skilst, so høvdu kommunurnar gjørt alt klárt, og starvsfólkini skuldu bara tiga og góðtaka. Hatta kemur ikki upp á tal í dag, tí soleiðis fæst ikki eitt samstarv í lag. Tað er eingin orsøk til at fara at uppfinna tann djúpa tallerkin enn einaferð. Vit hava sáttmála við eitt nú Fíggjarmálastýrið, og tað er hesin sáttmálin, sum hevur verið grundarlag, tá vit hava tosað við kommunurnar. Tí ímynda eg mær, at hesin sáttmálin eisini verður leisturin, til ein sáttmála við eitt nýtt felag, sigur Gunnleiv Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum at enda.



Gunnleiv Dalsgarð



DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin



Fríggja-og leygarkvøldið spæla
Hjarnar
5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00
Sunnudagin dystur í Faxe Kondi-ligaini á stórskíggjanum
Kaggin
Kaggin
Kaggin
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk
Matseðilin

Hósdagin 14. sept.:
Minuttbúffar

Fríggjadagin 15. sept.:
Kotelettir

Leygardagin 16. sept.:
Rullisteik

Mánadagin 18. sept.:
Kjøtbollar í karrysós

Týsdagin 19. sept.:
Bankikjøt

Mikudagin 20. sept.:
Hakkibúffur

Kostnaður 32,- kr.

***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Lesið
sosialin
sosialin
sosialin
-tað loysir seg

Eysturoy

Dansur í
EYDNUNI
á Oyrarbakka
Fríggjakvøldið spælir
TRIO
Leygarkvøldið spæla
LAGA-MENN
EYDNAN

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 16. september spælir
" COCKTAIL"
til dans
Fríggjakvøldið 15. september spælir "COCKTAIL" til dans í Lognbrá

Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT
Á SKY

Vilja tygum vi› í
**Í b‡in** - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur